

# Havið og framtíðin

## Tilmæli um burðardyggan virðisvøkstur úr havinum

Vakstrarforum

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office



**Havið og framtíðin** · Útgivið: Løgmansskrivstovan © 2021 · Sniðgivið: VIRKA

# ÚTFLYTA FYRI
# **3 MILLIARDIR MEIR**

Útflutningsvirðið á føroyskum sjófeingi var 4,3 mia. kr. Í 2010. Tíggju ár seinni var hetta virðið 7,7 mia. kr., sum svarar til ein vøkstur á 3,4 mia. kr. Men føroyska samfelagið kann fáa munandi meira burtur úr havtilfeinginum. Langtíðarmálið er, at vit vaksa líka nógv um útflutningsvirðið komandi tíggju árini. Tað vil siga, at:

---

*ÚTFLUTNINGSVIRÐIÐ Á FØROYSKUM SJÓFEINGI SKAL VERA 11 MILLIARDIR KRÓNUR Í 2030*

---

Fyri at røkka málinum er alt avgerandi, at vit økja munandi um burðardyggan virðisvøkstur úr havinum. Hetta merkir, at vøksturin skal vera varandi og hvørki vera, ella seinni blíva, til ampa fyri menniskju ella náttúru.

Málið kann best røkkast við at leggja dent á at vaksa um virðið á rávøruni, heldur enn bara at økja um nøgdirnar. Tí inniber langtíðarmálið omanfyri eina munandi størri virðisøking av tilfeinginum enn í dag, tað vil siga, at nógv meira virði fæst burtur úr hvørjum kilo av rávøru.

### MÁL FYRI 2030

Útflutningsvirði á 11 milliardir krónur




Øll tilmæli í hesum riti stuðla upp undir yvirskipaða málið omanfyri, og byggja á eina grundleggjandi fatan av burðardyggum vøkstri.

Langtíðarmálið fyri føroyskt sjófeingi leggur seg serliga upp at hesum fýra av teimum 17 heimsmálunum hjá Sameindu Tjóðum:



# VØKSTUR Á **TRYGGARI GRUND**

Ein stór øking í útflutningsvirði má byggja á yvirskipaðar karmar, matvørumenning, aling og fiskivinnu. Hetta ritið inniheldur uppskot um átøk, sum kunnu gerast innan hesi fýra høvuðsøki.



# TILMÆLI UM
# YVIRSKIPAÐAR KARMAR

Ein vinna má hava karmar, sum eru rímiliga støðufastir, og sum kunnu roknast út frammanundan. Skulu fyritøkur kunna gera íløgur og taka aðrar avgerðir, sum hava avleiðingar langt fram í tíð, er tað umráðandi, at fyritøkurnar vita, hvat er í væntu frá politiskum og umsitingarligum myndugleikum. Skotið verður upp at fremja niðanfyri standandi átøk.

### STØÐUFESTI OG GJØGNUMSKYGNI

1 Skipa karmarnar kring vinnuna soleiðis, at vinnufyritøkur kenna fortreytirnar fyri at virka vinnuliga, og at møguligar broytingar verða fráboðaðar í góðari tíð.

2 Orða ein vinnugreinapolitikk við visiónum, málum og kørmum fyri bláu vinnugreinarnar, so vinnufyritøkur í hesum greinum í stóran mun kenna fortreytirnar fyri virkseminum komandi árini.

### VITAN

3 Savna saman, greina og betra um atgongdina til vitan, sum fyritøkur kunnu grunda sínar avgerðir á og sum eisini kunnu veita eitt íkast til burðardyggan vøkstur. Til dømis veiða, oljunýtsla, lúsatøl, neyv útflutningshagtøl, nýtsla av kemiskum evnum v.m.

### STARVSFÓLK

4 Nøkta tørvin á útbúnum og ófaklærdum starvsfólki, og tryggja at starvsfólk við røttu førleikunum eru tøk at seta í starv í marinu vinnugreinunum.

### MARKNAÐARATGONGD HJÁ FISKAVØRUM

5 Betra um møguleikan at søkja viðurkendar góðkenningar og vistfrøðiligar sertifiseringar fyri føroyskar útflutningsvørur.

6 Uppraðfesta arbeiðið við marknaðaratgongd, soleiðis at nýggjar handilsavtalur og veterinerar avtalur kunnu gerast, og soleiðis at millum annað MSC góðkenning er tøk fyri allar fiskastovnar.

# TILMÆLI UM **MATVØRUR** OG **VIRKAÐAR VØRUR**

Føroyar kunnu verða millum tey bestu í heiminum at menna burðardyggar vørur úr havinum. Eydnast hetta, er talan um risastór virðir, sum kunnu fáast burturúr. Menningarmøguleikarnir eru sera nógvir, og skal framleiðslan av burðardyggum vørum taka dik á seg, mugu almennu karmarnir betrast og gerast støðufastir.

Vørur, ið geva nógv mest avkast, liggja ovarlaga í virðisvarðanum. Grannalond okkara Noreg, Danmark og Ísland arbeiða øll miðvíst við at menna vørur, sum eru ovarlaga í virðisvarðanum.

Virðisvarðin skal skiljast soleiðis, at ovastu vørurnar geva mest virðisøking í mun til nøgdina av brúktari rávøru. Framleiðslur av hesum vørum kunnu fleirfalda virðið í fiskivinnuni.




*Virðisvarði fyri vørur úr havtilfeinginum.*
*Kelda: Sigurjón Arason, Wefta 2019. Týtt: Janet Fríða Johannesen*



## MATVØRUGRANSKING, -MENNING OG -ÚTBÚGVING

7 Stovnseta ein matvørudepil, sum skal fremja matvørugransking og menning, og sum ger tað meira sannlíkt at tað kann eydnast at menna eina hátøkniliga framleiðslu úr havtilfeinginum.

8 Skipa fyri hægri matvøruútbúgvingum.

## NÝSKAPAN OG START-UP

9 Skipa fyri átøkum, sum stuðla undir kreativitet innan start-up vørur úr havinum. Eitt nú við klekingardeplum til start-up matvørur og øðrum átøkum, sum økja ferðina frá góðum hugskotum til burðardyggar framleiðslur.

10 Skipa karmar fyri javna rávørutilgongd hjá start-up'arum og virkjum á landi.

## GREIÐAR FYRISITINGARLIGAR KARMAR FYRI MATVØRUR

11 Áseta greitt arbeiðsbýti millum aðalráðini, sum hava leiklut á matvøruøkinum, soleiðis, at tað ikki er ógreitt, hvørja ábyrgd tey hava í sambandi við burðardygga matvøruframleiðslu úr havinum.

12 Seta serstaka nevnd fyri matvørur úr sjónum, sum kann koma við tilmælum um týdningarmikil matvørupolitisk evni, eitt nú um føðslu, matvørugóðsku, merking og nýggja lóggávu á økinum.

# TILMÆLI UM **ALING**

Aling er seinastu árini vorðin av týdningarmiklastu vinnum fyri føroyska samfelagið. Vøksturin byggir á tríggjar súlur: 1) tær náttúrugivnu umstøðurnar hjá alingini, 2) dugnasemi og vitan í vinnuni, og 3) teir karmar, sum tað almenna hevur ásett fyri virksemið, serliga á veterinera økinum.

Eingin ivi kann vera um, at størri virðisvøkstur kann fáast burtur úr alivinnuni, og at hetta kann gerast burðardygt, um rætt verður borið at. Partur av vøkstrinum í komandi árum fer at koma frá átøkum og íløgum, sum longu eru og framvegis verða gjørd í vinnuni. Samstundis kann tað almenna eisini gera átøk til at stuðla upp undir ein burðardyggan virðisvøkstur í alingini.

## SKIPA KARMAR FYRI NÝGGJAR BURÐARDYGGAR ALIHÆTTIR

13 Ávísa nýggjar aliteigar á opnum havi og streymharðum økjum, har tað verður mett at vera umhvørvisliga og veterinert burðardygt, og lýsa eftir áhugaðum umsøkjarum og útluta aliloyvi til hesar aliteigar.

14 Gjøgnumganga lógarverkið kring alivinnuna fyri at optimera tað í sambandi við serligu viðurskiftini viðvíkjandi aling á opnum havi og í lokaðum eindum.

15 Útvega heimild í løggávu til Landsdjóralæknan at loyva flyting av alifiski millum aliøki, har tað er veterinert ráðiligt.

## STYRKJA GRANSKING OG ÚTBÚGVING INNAN FYRI ALING

16 Seta á stovn yrkisútbúgving innan fyri aling.

17 Fíggjarliga raðfesta – eitt nú við árligari fokuspulju – gransking í alivinnu innan fyri raðfest øki. Serliga gransking í lús, fiskavælferð og nýggjum alihættum.

## MENNA KARMARNAR TIL SKELJAALING OG TARAALING

18 Skipa eina økisplanlegging á sjónum, har tað verður kannað, hvar tað ber til at ávísa nýggj øki til skelja- og taraaling.

19 Átak at menna eina heilsufrøðiliga og umhvørvisliga skipan kring skelja- og taraaling.

20 Fyrireika eina skipan fyri kanning av toksinum í sambandi við skeljaaling.

21 Geva møguleikar fyri vistfrøðiligari sertifisering av taraaling (ES-sertifisering).

## MINKA $CO_2$-ÚTLÁTIÐ FYRI FØROYSKA ALIVINNU

22 Minka orkutørvin gjøgnum menning av orkusparandi tiltøkum fyri bátaflutning og orkunýtslu á smoltstøðunum.

23 Størri partur av elframleiðsluni framleiðast úr varandi orkukeldum.



# TILMÆLI UM **FISKIVEIÐU**

Karmarnir kring føroyska fiskiveiðu hava verið óstøðugir seinastu árini, og tað hevur darvað framburð og íløgur. Hóast nógv hevur verið til av uppsjóvarfiski seinastu árini, hevur fiskiskapurin á landgrunninum sum heild verið vánaligur. Seinastu tvey árini hava vit sæð fleiri íløgur í nýbygt skip umframt endurnýggjan av flotanum.

Tað er tó framvegis stórur tørvur á endurnýggjan og rationaliseringum í heimaflotanum. Við verandi flotasamanseting og fiskiskapi er torført at fáa búskaparligt lønsemi í fiskiskapin. Fleiri reiðarí hava torført við at manna skipini. Fleiri línuskip eru løgd orsakað av, at tey ikki fáa manning, tí at fiskiskapurin og lønsemið ikki eru nóg góð. Tí er tað átrokandi at taka ítøkilig stig fyri at tryggja burðardyggan vøkstur í fiskiveiðuni.

## BURTUR VIÐ FORÐINGUM FYRI RATIONALISERING

24 Endurskoða og tillaga serskattin við endaliga avhending av fiskirættindum, so at hann ikki forðar fyri tillaginum.

25 Loyva at fleiri loyvir vera samanløgd í senn.

## TRYGGJA GÓÐSKUNA

26 Seta størri og ítøkiligari krøv til hagreiðing, fiskanøgd fyri hvønn kassa, temperatur á landaðum fiski o.s.fr.

27 Seta krøv til vitan um matvørugóðsku fyri sjófólk.

## GAGNNÝTSLA Á LÍVFRØÐILIGA BURÐARDYGGUM STØÐI

28 Áseta lívfrøðiliga burðardygg veiðitrýst.

29 Fíggjarliga uppraðfesta gransking og datainnsavning um fiskastovnar, havumhvørvi og fiskiskap.

30 Betra um samstarvið millum granskingarstovnar.

31 Uppraðfesta viðgerð og greining av veiðihagtølum og atgongdina til tær.

## FRAMKOMNAN, EFFEKTIVAN OG UMHVØRVISVINARLIGAN FISKIFLOTA

32 Menna verkætlanir, sum kunnu minka um orkunýtsluna.

33 Savna hagtøl um útlát av veðurlagsgassum fyri hvønn skipabólk og gera tey atkomilig.

34 Bert útluta fiskirættindi til ávíst fiskaslag til skip, sum eru egnað til slíkan fiskiskap.

35 At taka sama tilfeingisgjald frá øllum skipabólkum fyri sama fiskaslag.

36 Skapa umstøður, sum gera tað léttari at tillaga flotan.

37 Eyðmerkja og burturbeina sosial atlit, soleiðis at avmarkandi og avlagandi skipanir verða niðurlagaðar yvir komandi 5 árini. Sosial atlit eiga at verða tikin í aðrari lóggávu.

## ALLA RÁVØRU TIL HØLDAR

38 Arbeiða víðari við eini ætlan um, hvussu alt skal fáast til høldar innan fyri eitt ávíst áramál.

39 Menna menningarverkætlanir við tí fyri eyga at fáa meira til høldar.

## GAGNNÝTA ÓTROYTT TILFEINGI

40 Seta orku av til at kanna nærri, hvussu ótroyttir møguleikar, t.d. reyðæti ella mesopelagiskt tilfeingi, kunnu gagnnýtast.

41 Økja játtanina til Havstovuna til at betra vitanina um hetta tilfeingið.

42 Seta í gongd royndarverkætlanir og royndarfiskiskap eftir hesum djóra- og fiskasløgum.



Útflutningsvirðið á føroyskum sjófeingi skal vaksa úr 7,7 upp í 11 milliardir áðrenn 2030. Hetta rit er eitt uppskot til, hvussu tað kann lata seg gera.

Arbeiðið byrjaði á várið í 2021, tá ið Vakstrarforum gjørdi av at raðfesta havið sum vakstrarøki.

Løgmaður setti í februar 2021 Vakstrarforum, sum í hálvt annað ár skal arbeiða við møguleikum fyri virðisvøkstri í føroyska samfelagnum. Endamálið er at birta upp undir burðardygga virðisøking í breiðari merking, sum kann betra um og styrkja vælferðina í Føroyum langt inn í framtíðina.

Les meir á
**Vakstrarforum.fo**